# PLANTUPAKKAR

## 1 Escallonia macrantha, Eskallonia



Hávaksin veturgrønur runnur. Rættiliga harðførur. Reydligar blómur, og angandi bløð. Trívst best í góðari, gloprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál. Natúrlig útbreiðsla: Kili. Okkara tilfar: uppruni úr Orknoyggjum.

## 2 Abies koreana, Koreaaðalgrann



Lítið nálatræ. Sera snotuligt og tættvaksið vakstrarlag. Nálirnar blágrønar og tættar. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini, men trívst tó best í moldkendari jørð og góðari lívd. Er vælegnað, har lítið pláss er. Natúrlig útbreiðsla: Korea.

## 3 Fagus Sylvatica 'Atropurpurea', Reyðbók



Stórvaksið leyvfellandi træ (verður bert miðalstórt í Føroyum). Dimmreyð bløð. Trívst ikki væl her, og krevur tí tey bestu vakstrarlíkindini, t.e. góða lívd og góða, kálkríka mold. Mest nýtt sum staktræ. Avbrigdið er stórvaksin klonur. Úr Danmark.

## 4 Sorbus mougeottii, Alpuroynir



Miðalstórt leyvfellandi træ. Tætt vakstrarlag. Grágrøn bløð. Nógvar hvítar blómur og reyð ber. Harðførur. Eingi serlig krøv til jørðildið. Líkist nógv Seljuroyni, men er minni av vøkstri, og blómar og fruktar betur. Natúrlig útbreiðsla: vestaru Alpufjøll. Okkara tilfar: av donskum uppruna.

## 5 Leptospermum humifusum, Rósumyrta



Miðalhøgur veturgrønur ella hálvavegna veturgrønur runnur. Smáar, hvítar blómur. Smávaksin, leðurkend bløð, brúngrøn á liti. Tørvar góða mókenda jørð og góða lívd, um hann skal trívast. Natúrlig útbreiðsla: úr Tasmania. Okkara tilfar: úr Tasmania.

## 6 Larix kaempferi, Japanslerkur



Stórvaksið leyvfellandi nálatræ. Nálirnar fagurgulan heystarlit. Best í djúpari, gloprutari jørð. Harðførur, men veksur seint og krókut. Kann eisini hóska væl sum klipt tøtt runnagirðing. Natúrlig útbreiðsla: Japan. Okkara tilfar: av donskum uppruna.

## 7 Lonicera periclymenum, Skógar Kaprifolia



Leyvfellandi klivrunnur. Hóskar væl at vaksa upp eftir vegginum e.tíl. Bløðini myrkt grøn á rættuni og blálig á ranguni. Blómurnar gullittar ella reyðlittar, anga óføra væl í skýmingini. Trívst best í góðum vakstrarlíkindum, tolir nakað av skugga. Eitt avbrigdi er at finna í fleiri gomlum gørðum. Úr Vesturevropa.

## 8 Weigela 'Bristol Ruby', Reyður Klokkurunnur



Miðalhøgur til høgur leyvfellandi runnur. Heldur upprent og breiðvaksið vakstrarlag. Skotini ljóst brún ella reyðbrún. Bløðini dimmgrøn. Blómurnar myrkareyðar, stórvaksnar, í smáum tyssum. Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini.

## 9 Berberis ilicifolia



Høgur, heldur tættvaksin, veturgrønur runnur. Skyggjandi, dimmgrøn bløð, átøk Kristtorn. Brandgular blómur, tíðliga á vári og aloftast eisini aftur um heystið. Dimmblá ber, ið smakka væl. Tolir nakað av skugga. Trívst væl hjá okkum í hampiligari lívd og góðari jørð. Natúrlig útbreiðsla: Suðuramerika. Okkara tilfar: uppruni úr Eldlandinum

## 10 Spiraea betulifolia



Lágvaksin leyvfellandi runnur. Reyðbrúnar greinar. Bløðini lík bjarkarbløðum. Hvítar blómur í tøttum klasaskjólum. Harðførur. Trívst best í gloprutari jørð og góðum sólargangi. Natúrlig útbreiðsla: Fjareystur. Okkara tilfar: úr Danmark.

## 11 Saxegothaea conspicua



Miðal stórt tættvaksið nálatræ. Myrkagrønar nálir og reyðbrúnan børk. Trívist best í góðari jørð og góðum vakstrarlíkindum og tolir skugga.

## 12 Pinus mugo var rostrata, Fronsk fjallafura



Lítið nálatræ, harðført, seinvaksandi. Eingi serlig krøv til jørðildið, men veksur best í gloprutari jørð. Slagið tolir ikki skugga. Hetta slagið av Fjallafuru hevur vanliga bert ein bul ("einstammað"). Úr Pyrineafjøllum.

